Fróðskaparsetur Føroya

24. apríl 2008

**Fundarfrágreiðing til setursráðsfund nr. 4/2008**

Dagur og klokkutíð: Hósdagin 24. apríl 2008, kl. 13-15.30

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Hans Pauli Joensen, vararektari og megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Malan Marnersdóttir, megindeildarráðsf. fyri FMD
Rúna Hjelm, setursskrivari

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 3/2008 setursráðsfundi 27. mars 2008.**
Góðkend við broyting í máli nr 5 um eldrapolitikk á setrinum. Í nevndini, ið skal orða eitt uppskot um eldrapolitikk, eru Eivind Weyhe, Elin Súsanna Jacobsen og Marjun í Túni Mortensen.

2. **Góðkenning av dagsskrá.**
Góðkend.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarlógin 2008.** (J.nr. (3) 10-11.01-20070001).
Fíggjartøl og nýggjar starvsetanir fyri 2008 vóru gjøgnumgingnar. Samtykt varð, at rektarin og setursskrivarin skulu fáa ein fund í lag við Mentamálaráðið um raðfesting av starvssetanum.

4. **Upprit um raðfestingar av útbúgvingum á Fróðskaparsetrinum.** (J.nr. (3) 10-40-20070016). *(Fundarskjal: Skriv 11.4.08 BiJ).*
Lektarastarvið í stjórnmálafrøði á Søgu- og samfelagsdeildini verður lýst at seta 01.10.2008.

5. **Setan av skrivstovufólki til Setursskrivstovuna, fult starv, og skrivstovufólki til Føroyamálsdeildina, ¾ starv.** (J.nr. (3) 10-21.01-20070006 og 10-21.03-20070005). *(Fundarskjøl: Skriv 11.3.08 RJ, 15.4.08 WP og 17.4.08 RH).*
Samtykt.

6. **KT-samstarvið.** (J.nr. (3) 10-88-20070001).
Rúna kunnaði um gongdina í málinum, og setursráðið tók undir við ætlaðari tilgongd.

7. **Trupulleikar við bandasavnsskrivstovuni á Føroyamálsdeildini. Arbeiðseftirlitið metir, at skrivstovan er heilsuskaðilig.** (J.nr. (3) 10-12-20070004).

   Setursráðið samtykti at flyta bandasavnið til J.C. Svabosg. 7.

8. **Námsferðarstuðul 2008. Støðutakan til nýtt lýsingarumfar við freist 15. juni.** (J.nr. (3) 10-52-20070003).
   Samtykt.

9. **Gransking í sambandi við søvnini á Føroyamálsdeildini.**
   Malan Marnersdóttir legði málið fram. Setursráðið metir, at søvnini á Føroyamáldsdeildini hava stóran týdning fyri framtíðar gransking á setrinum. Goymsla, uppstiging og viðlíkahald av søvnunum er eitt mál, sum setrið eigur at átaka sær at fáa loyst. Setursráðið heitir á rektaran um at taka málið upp við Mentamálaráðið og møguliga fáa samskipað goymslu og viðlíkahald við aðrar stovnar. Gransking í sambandi við søvnini hevur Føroyamálsdeildin ábyrgdina av at raðfesta.

10. **Umsókn frá KT-leiðaranum um loftshæddina í J.C. Svabos gøtu 7 til KT-tænastuna.** (J.nr. (3) 10-39-20070001).
    Samtykt at játta umsókn.

11. **Kunning frá deildunum o.ø.:**

a. **Fundur á Føroyamálsdeildini 1.4.08.** (J.nr. (3) 10-01-20070002).
b. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 14.4.08.** (J.nr. (3) 10-01-20070004).

Fyri a. og b. var onki at leggja afturat

**Avgreiðslumál:**

12. **Starvssetanarmál at staðfesta, og avvarðandi deildir verða samstundis bidnar um uppskot til metingarnevndir:**

a. **Professari/lektari í mýlskari lívfrøði á Náttúruvísindadeildini.** (J.nr. (3) 10-21.04-20070005).
b. **Professarar/lektarar í kunningar- og samskiftistøkni á Náttúruvísindadeildini, 2 størv.** (J.nr. (3) 10-21.04-20070006).
c. **Lektari í málfrøði á Føroyamálsdeildini.** (J.nr. (3) 10-21.03-20070003).
d. **Adjunktur í bókmentafrøði á Føroyamálsdeildini.** (J.nr. (3) 10-21.03-20070004).
e. **Lektari og adjunktur í løgfrøði á Søgu- og Samfelagsdeildini.** (J.nr. (3) 10-21.02-20070005).

Fyri a., b., c., d. og e. vóru setanarmálini staðfest, og samtykt varð at góðkenna metingarnevndirnar millum funda.

13. **Metingarnevndin til støddfrøðistarvið á Náttúruvísindadeildini at staðfesta. Í nevndini eru: Martin Svensson, lektari á Institut for Matematik og IT, Syddansk Universitet, Erling Størmer, professari á Institutt for Matematik, Universitetet i Oslo og Klaus Thomsen, lektari á Institut for Matematik, Aarhus Universitet.** (J.nr. (3) 10-21.04-20070003).
    Staðfest.

14. **Góðskriving. Føroyamálsdeildin mælir til, at Heini Olsen fær 120 ECTS av lestrinum í donskum á Det Humanistiske Fakultet, Københavns Universitet góðskrivað sum hjánám á samansettum MA. At góðkenna.** (J.nr. (3) 10-43.03-20070006).

Góðkent.

**Kunningarmál:**

15. **Mánaðarjavni ultimo mars 2008, nýtsla fyri alt Fróðskaparsetrið 4.529.500 kr.** (J.nr. (3) 10-11.01-20070001).
Tikið til eftirtektar.

16. **Frágreiðing frá Akihisa Arakawa frá ferðini í Føroyum síðsta summar, hann var á summarskeiði á Føroyamálsdeildini og fekk eisini námsferðarstuðul.** (J.nr. (3) 10-52-20070001).
Tikið til eftirtektar.

17. **Útgávur:**

**a. Ársfrágreiðing 2007, Kommunusamskipan Føroya**
**b. Ársfrágreiðing 2007, Íverksetarahúsið, Klaksvík**
**c. Ársfrágreiðing 2005-2007, Fyribyrgingarráðið**
**d. *Faroe Islands Fisheries & Aquaculture, Responsible Management for a Sustainable Future,* Fiski- og tilfeingismálaráðið 2008**
**e. *At blive mor. Misbrugte kvinders problemer og behov for hjælp,* Servicestyrelsen, Udsatteenheden, København.**